# Vaktarskifti á Bryggjuni

**Hølini hjá føroysku sendistovuni á Norður Bryggjuni vóru stúgvandi full av fólki, tá Tryggvi Johansen gavst í starvinum, sum sendimaður í Keypmannahavn**

UMBOÐAN FØROYA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Tryggvi Johansen bjóðar Herálvi Joensen vælkomnum á Norður Bryggjuna*
*Mynd: Símun Jóannesarson Hansen*

Hósdagin var samkoma á Norður Bryggjuni í Keypmannahavn, har Tryggvi Johansen segði farvæl við starvið sum sendimaður Føroya í Keypmannahavn og bjóðaði Herálvi Joensen vælkomnum í sendimannastarvið.

Nógv fólk var savnað á Norður Bryggjuni, og hølini vóru á tremur. Nógv umboð fyri útlendskar sendistovur vóru har, og eisini fleiri kend andlit sum t.d. løgmaður Jóannes Eidesgaard, songkvinnan og sjónleikarin Annika Hoydal, leiðarin í Føroya Húsinum Martin Fjallstein, fyrrverandi bankastjórin Jørn Astrup, fyrrverandi løgmaður Jógvan Sundstein og fyrrverandi ríkisumboðsmaðurin Niels Bentsen.

Men eisini hópin av fólki úr føroyska umhvørvinum í Keypmannahavn. Jóannes Eidesgaard løgmaður helt røðu, og takkaði Tryggva fyri trúgva tænastu, hann bjóðaði eisini Herálvi vælkomnum og segði seg verða sannførdan um, at hetta var rætti maður til starvið. Tryggvi helt somuleiðis røðu, eins og Niels Bentsen fyrrverandi ríkisumboð, var danska íslettið á røðarapallinum.

Hølini hjá sendistovuni eru sera hugnalig, og góvu samkomuni teir heilt røttu karmarnar. Tó var eina løtu dekan ov heitt og trongt. Men hetta slepst neyvan undan, tá ein so sentralur maður gevst í tí starvið, sum hann hevur sitið í síðan í sjeytiárunum.

Samkoman var býtt upp millum eina fyri sendifólk, embætisfólk og handilssambond, sum byrjaði kl. 16.00, og so eina samkomu har almenningurin varð boðin innar kl. 17.00, hetta uppbýtið gjørdi, at tað var møguligt at vera har innið. Men tað einu løtuna varð sera trongt.

Tryggvi er givin í starvinum, men Herálvur byrjar ikki fyrr enn aftan á nýggjárið. Hósdagin vóru teir tó báðir á Bryggjuni.

# Saknur verður í Tryggva

UMBOÐAN FØROYA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Jógvan Sunstein fyrrverandi løgmaður var og takkaði Tryggva fyri trúgva tænastu*
*Mynd: Símun Jóannesarson Hansen*

Í talu síni nevndi Tryggvi, at Jóannes Eidesgaard var sjeyndi løgmaður, ið hann hevði starvast undir. Ein av hinum seks luttók á samkomuni, tað var Jógvan Sundstein, ið sat sum løgmaður í 1989-1991. Jógvan segði bara hava gott at bera Tryggva, og ivaist ikki í, at saknur fór at verða í honum. "Sum løgmaður og landsstýrismaður, upplivdi eg hann altíð sum dugnaligan og beinasaman. Minnist t.d. væl, hvussu hann gekk okkum til handa hasa truplu náttina í 1992." sigur Jógvan Sundstein.

Maður kemur vanliga í mans stað, og Jógvan kennir Herálv nóg væl til at vita, at hetta er ein ordiliga dugnaligur maður, ið fer at røkja starvið væl.

Hann heldur, at Tryggvi hevur verið eitt gott umboð fyri Føroyar í diplomatiska umhvørvinum. Hetta er Niels Bentsen fyrrverandi ríkisumboðsmaður samdur í. Hann segði, at serliga í tíðini, tá skipað var fyri Føroyar í Fokus, upplivdi hann hvussu væl Tryggvi dugdi, at umboða Føroyar, ella selja Føroyar.

# Tryggvi hevur skapt hetta starvið

UMBOÐAN FØROYA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard umboðaði landstýri á samkomuni á Norður Bryggjuni, og hann takkaði Trúgva fyri øll árini, sum hann hevur umboða Føroyar, og segði m.a.: "Tá tú tók við hesum starvinum var føroyska umsitingin so lítil, at eg vænti ikki at tú hevur fingið nógvar leiðreglur, so tú hevur givið hesum starvi ein væl meira persónligan dám, enn tílík størv vanliga hava, tú kanst tí vera errin í dag, tí tú fert frá eini sendistovu, sum tú sjálvur hevur skapt."

Løgmaður vísti á at alheimsgerðin er vorðin ein neyðugur partur av okkara tilveru, og at tað at goyma seg ikki er ein møguleiki. Ikki um man ætlar sær, at halda fæst í verandi liviumstøðum. Í hesum sambandi gerst hetta starvið alt meira týðandi. Hann frøddist um hvussu góðan avloysara Føroyar høvdu fingið í starvið. Ein vælútbúgvin maður við royndum úr umsitingini, sum longu hevur sitið í fleiri høgum sessum. Hann ynskti Herálvi Joensen bestu eydnu við at røkja hetta týðandi starvið.



*Føroya løgmaður Jóannes Eidesgaard helt røðu vegna lanstýrið*
*Mynd: Símun Jóannesarson Hansen*

# Eg traðki ikki í Tryggvasa skógvar

UMBOÐAN FØROYA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Herálvur Joensen nýggi sendimaður Føroya í Keypmannahavn, segði seg slettis ikki ætla sær at royna, at traðka í skógvarnar hjá Tryggva. "Hetta er eitt broytt starv, ið eg fari í. Eg verið í nógv størri mun stýrdur heimanífrá. Hetta fer at minna meira um amabassadørstørv, sum tey ið vit kenna úr øðrum londum, meðan umboðandi parturin verður minnið enn higartil.

Men eg gleði meg til starvið, og eingin ivi er um, at hesir karmarnir eru frálíkir at arbeiða í, og ikki minst sera øðrvísi frá teimum, ið eg eri vanur at virka undir. Allur tann mentanarligið parturin av húsinum, er heilt nýggjur fyri mær." sigur Herálvur. Herálvur søkti starvið, tí hetta var ein spennandi avbjóðing, og tí konan fegin vildi av landinum, at víðka sær um útbúgvingina. Men hetta er ein gamal dreymur. Tá hann læs løgfrøði, hugsaði hann ofta um diplomatisk arbeiðið, men so endaði hann í Føroyum, har leiðarastørv læstu hann fastan. Men nú var møguleikin til staðar, og mótið er gott.

# Eg veit ikki, hvat eg fari at gera

UMBOÐAN FØROYA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Tryggvi er ikki greiður yvir, hvat hann nú fer at gera, men ætlar sær ikki at sita hendur í favn*
*Mynd: Símun Jóannesarson Hansen*

Tryggvi segði seg ikki vita, hvat tíðin fór at bjóða honum. Men hann ætlaði í øllum førum ikki at seta seg hendir í favn. Tað tími eg rætt og slætt ikki segði smílandi og fráfarandi sendimaður Føroya í Keypmannahavn, tá vit fingu orð á hann. Hann segði, at allir vinmennirnir, sum vóru farnir frá vegna aldur, søgdu hetta vera bestu tíðina í lívinum, so hann var nokkso spentur. Men annars var hetta ein dagur, sum hann hevði havt sera trupult við at gleða seg til.

### Errin av avrikunum

Hann segði seg vera serstakliga glaðan fyri at hava sloppið at røkt hetta starv. Hann er errin av, at hann í starvinum hevur givið Føroyum eitt pláss í diplomatiska umhvørvinum.

Hann greiddi frá um hvussu spennandi starvið hevði verið, tók nakrar jaligar upplivingar fram, sum Norður Bryggjuna og Føroyar í Fokus, og prátaði eisini um tær ringu tíðirnar, fyrst í 90'unum tá donsku miðlarnir sáplaðu Føroyar niður.

Men samanumtikið var gleðin størri enn vansarnir. Eitt av teimum nýggjaru átøkunum gleddist hann serliga um, tað var ólavsøkuhaldið á Norður Bryggjuni. Tí hetta er eitt stórsligið tiltak, sum ekkó'ar í øllum nærumhvørvinum, og vísir danum eina góða síðu av Føroyum. Hann segði seg noyðast at nevna Ova Joensen, og tann fantastiska góða og jaliga miðladekningin, sum Ovi gav føroyingum, tað var ordiliga stuttligt at uppliva.

### Fer ikki at blanda seg

Eg ætli mær ikki at blanda meg í starvið hjá Herálvi. Eg eri farin úr starvi, og eg eri altíð til reiðar at ráðgeva ella taka eina hond í, um tørvur er á tí, og um heitt verður á meg. Men eg ætli mær ikki at ganga dagligt her innið, og blanda meg í starvið hjá Herálvi.